## VENJINGARSKÚLIN

Søkt verður eftir einum lærara í tíðaravmarkað starv at byrja so skjótt sum gjørligt til 30.06.2008 fyri lærara í farloyvi.

Skúlin hevur brúk fyri lærara, sum kann undirvísa í føroyskum, donskum og týskum í 8. – 10. flokki, sum hevur góð samstarvsevni, er opin, kreativur, vil vera við til at menna skúlan, átaka sær starvið sum flokslærari, og sum er sinnaður at arbeiða í sjálvstýrandi toymi!

Starvið er lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Meira fæst at vita um starvið við at seta seg í samband við skúlastjóran, Petur Ova Petersen á tlf. 302570 ella 213502.

Umsóknir við prógvum og møguligum viðmælum skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi **mánadagin 29. oktober á middegi.**

*Í Venjingarskúlanum verða komandi skúlaár umleið 450 næmingar í 19 flokkum og her koma at starvast 37 fólk. Lærararnir eru skipaðir í 5 sjálvstýrandi toymi : 1.-3. fl., 4. og 5. fl., 6. og 7. fl., 8.-10. fl. og sertoymi. Skúlin húsast í trimum bygningum : 1. og 2. flokkur halda til á Ytra skúla við Landavegin, 3. fl. á Heimara skúla við Fr. Petersens gøtu og 4.-10. fl. eru í skúlanum á Stórheyggi.*

**Venjingarskúlin**
handan Á 14
FO-100 Tórshavn

## Ársveitslan hjá Landsfelag Pensjónista

Leygardagin tann 20. oktober 2007 kl. 17.30 til 24.00 verður ársveitslan hildin á Hotel Føroyum.

Tey, ið ætla sær á veitsluna skulu tekna seg hjá sínum lokalfelag og gjalda har. Kostnaðurin er kr. 200,- pr. luttakara.

Atgonguseðilin er samstundis lutaseðil.

Seinasta freist at tekna seg er mánadagin 15. oktober.

NEVNDIN

## Frá Sláturmiðstøðini

**Vit hava yvirtikið arbeiðið hjá AG – Kjøt á Toftum**

Vit eru byrjaðir at fletta, so um tú ikki hevur tíð og orku, so eru vit til reiðar at hjálpa tær, óavmarkað nøgd.

Eisini er møguleiki at bíða, ímeðan flett verður.

Vit kunnu eisini skipa fyri flutningi, um tað er neyðugt.

Skjótt og væl úr hondum greitt.

**Ring: 21 67 47 ella 28 67 87**

**Sláturmiðstøðin**
Fjøruvegur 1 · 785 Haraldssund

## Landslæknin Starvslýsing

### Landslæknin søkir eftir skrivstovufólki

Hjá Landslæknanum er eitt skrivstovustarv (kontorfunktionær) á 29 tímar um vikuna leyst at byrja **1. november 2007 ella skjótast til ber eftir hetta.**

Vit søkja ein virkisfúsan persón, sum kann taka sær av vanligum skrivarauppgávum umframt meira sjálvstøðugum uppgávum.

**Harumframt leggja vit dent á, at umsøkjarin hevur:**

- Góðan kunnleika til føroyskt og danskt
- Góðan kunnleika til teldu, serliga forritið Word og evt. Excel og PowerPoint
- Góð evni at samskifta og samstarva
- Royndir við heimasíðusmíð er ein fyrimunur, tó ikki krav

Landslæknin er ein statsstovnur undir Indenrigs- og Sundhedsministeriet, sum vegna Sundhedsstyrelsen hevur eftirlit við tí heilsufakliga virksemi, ið løggild heilsustarvsfólk útinna í Føroyum. Landslæknin er ráðgevi hjá danska statinum, Føroya Landsstýri og kommunalum mynduleikum í heilsuligum, hygieiniskum, sosialum og umhvørvisligum spurningum. Landslæknin ger og gevur út árligar heilsulagslýsingar fyri Føroyar og veitir stuðul til rættar- og løgreglumyndugleikar í rættarlæknaligum og líknandi málum.

**Lønar- og setanartreytir**
Lønar- og setanartreytir eru sambært organisatiónsavtalu millum Finansministeriet og HK/STAT.

**Kunning**
Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Lonu Johansen á telefon +298 311832.

**Umsóknin**
Øll áhugaði uttan mun til aldur, kyn, trúgv ella uppruna verða biðin um at søkja starvið.

Umsókn saman við avritum av viðkomandi prógvum, CV v.m. skulu sendast til:

Landslæknan, Sigmundargøta 5, Postboks 9, FO-110 Tórshavn ella við telduposti til foe@sst.dk, og verða okkum í hendi **í seinasta lagi 19. oktober 2007.**



## LOYSNIN!

**...ein lykil til alt húsið, virkið ella skúlan !!**

**Vit loysa lás- og lyklatrupulleikar.**

**Vit eru serkønir í at gera:**

Ruko systemlás · Skipan av lásum
Umvælingar · Skera lyklar til · Umskipa

**TÓRSHAVNAR LÁSASERVICE**
v/Jahn Petersen
**TEL 310 411 · FARTEL 215 411**
teldupostur: lasasmid@post.olivant.fo

**Frá Barnagarðinum á Teiginum á Sandi:**

## Pedagogar

Vit sóknast eftir 2 pedagogum. Størvini verða sett 15. november, 2007. Talan er um ávíkavist eitt fast starv 30 tímar um vikuna og eitt barnsburðarfarloyvisstarv í 25 tímar um vikuna í 3 mánaðir.

**Krøvini til tín eru:**

- at tú er fyrikomandi og erlig/ur
- at tú dugir at arbeiða sjálvstøðugt og ábyrgdarfult í samráð við børn og starvsfelagar.
- at tú heldur arbeiði við 0-9 ára gomlum børnum vera spennandi og avbjóðandi.
- at tær dámar at verða úti í øllum veðrið.
- at tú dugir at síggja møguleikar heldur enn avmarkingar.
- at tú er nærverandi og dugir at lurta.
- at tú vil verða við til at menna barnagarðin og tað arbeiði vit hava sett okkum fyri.

Størvini verða lønt sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og KAF/Fíggjarmálaráðið. Arbeiðstíðin er vanliga millum kl. 7.30 og 17.30.

Tú fært nærri upplýsingar um størvini, um tú vendir tær til Lailu Marston Petersen, stovnsleiðara á tlf. 361750/212751.

Skrivlig umsókn við møguligum viðmælum, skal sendast til Sjálvsognarstovnin Barnagarðin á Teiginum, Koytugøta 1, 210 Sandur. Umsóknarfreistin er úti 31.10.07. Allir umsøkjarar fáa svar.

**Sjálvsognarstovnurin**
**Barnagarðurin á Teiginum**

## Elektrikkari søkist!

Vegna økt virksemi, verður søkt eftir einum royndum elektrikkara til fjølbroytt el-arbeiði v.m. Má kunna arbeiða sjálvstøðugt.

Koyrikort til bil krevst.

Áhugaðir kunnu senda okkum ein teldupost!

EINAR MIKKELSEN Sp/f

Bøgøta 12 · Postboks 321 · 110 Tórshavn
tel 31 22 11 · el-mikk@post.olivant.fo

## Pensionistafelagið í Havn

**Ársaðalfundur verður í Losjuni, Tinghúsvegur 18, mikukvøldið 31. oktober kl. 19.00.**

**Dagsskrá sambært § 11 í lóg felagsins.**

**Nevndin**